# Minibridge

- Minibridge er er fyrsta stigið til at spæla bridge.
- Minibridge er lætt at læra og gevur tær hilling á, hvat bridge er.
- Um hetta er nakað fyri teg, so ber til at læra teg bridge eftir 4 kvøldum.

Minibridge verður spælt við einum vanligum kortspæli við 52 kortum. Eingir jokarar eru við.

## Fýra spælarar kring eitt borð

Fýra spælarar sita kring eitt borð. Spælararnir verða nevndir eftir høvuðsættunum: Norður, Eystur, Suður og Vestur. Norður (N)-Suður(S) eru í parti og Eystur (E)-Vestur(V) eru í parti. Í bridgehøpi eru N-S eitt par og E-V eitt par.

Spælararnir avgera sjálvir, hvør er í parti.

## Flest stikk

Í minibridge ræður um, at pørini bæði kappast um at taka flest stikk.

Spælararnir fáa 13 kort í part. Givið verður eitt kort í senn. Tann sum gevur, byrjar við spælararnum, sum situr til vinstru.

## Hægsta kort vinnur stikkið

Sjálvt spælið er, at ein spælari spælir út, tvs. leggur eittt kort á borðið. Hini tríggir spælararnir skulu so ein og ein leggja eitt kort á borðið. Kortini skulu leggjast í somu raðfylgju, sum urið gongur. Tann, sum hevur hægsta kortið, tá allir fýra spælarar hava lagt sítt kort, vinnur stikkið.

Essið er hægst, so koma Kongur, Frúgv og Drongur og so frá 10-um til tveyir.

## Fýra litir

Í einum kortspæli eru fýra litir:

♠ Spaðari
♥ Hjartari
♦ Rútari
♣ Kleyvari

Spaðari og hjartari eita hálitir (major-litir) og rútari og kleyvari eita láglitir (minor-linir).

## Fylgja liti

Eftir at tann fyrsti hevur lagt sítt kort á borðið, skulu hinir spælarar fylgja liti, um teir kunnu. Fær ein spælari ikki fylgt liti, so kann hann tveita okkurt kort. Tann, sum vinnur stikkið, skal spæla næsta kort út.

## 5 sløg av spølum

Til ber at spæla 5 sløg av spølum. Spælast kann “uttan trumf” (UT) ella við einum av teimum fýra litunum sum trumfi. Tá spælt verður uttan trumf, hava allir litirnir sama virði. Men tá spælt verður við, at ein litur er trumfur, so vinnur hesin liturin á hinum trimum. Um til dømis spaðari er trumfur, so vinna spaðarar á hjartara, rútara og kleyvara. Í øllum fimm spølunum skulu spælararnir fylgja liti, um teir kunnu – eisini í trumflitinum. Um spælt verður við trumfi, og ein spælari ikki kann fylgja liti, so ber til at stinga tvs. spæla ein trumf, sum vinnur stikkið, um ikki onkur annar spælari hevur lagt ein hægri trumft til sama stikk.

## Ein spælførari

Eitt eyðkenni við minibridge, sum ikki kennist aftur í whist og líknandi spølum, er, at í bridge er ein spælførari, sum avger, hvussu meldið (kontraktin) skal eita ella við øðrum orðum, hvør kontraktin skal vera. Spælførarin avger, um hann vil spæla uttan trumf ella um ein av teimum fýra litunum skal vera trumfur.

## Spælførari sigur kontraktina

Kontraktin skal verða soleiðis, at spælførarin sigur eina kontrakt, har hann ætlar at vinna í minsta lagi 7 stikk av teimum 13 stikkunum, sum eru í hvørjum spæli. Men sigur spælførarin t.d. at hann ætlar at vinna 10 stikk við spaðara, sum trumfi og tað eydnast, so fær tað parið eykastig. Hetta verður nevnt, at melda “útgang” – tað venda vit aftur til.

# 11 løtt stig til minibridge

## 1. Blanda og gev

Blanda kortini og gev eitt og eitt til allar fýra spælararnar. Gev fyrst spælaranum, sum situr til vinstu, og so eitt og eitt kort til allir spælararnir hava fingið 13 kort.

## 2. Set kortini í raðfylgju

Sett øll kortini saman í litir og í raðfylgju, har Essið er hægst og síðani niður eftir. Ansa væl eftir, at hinir spælararnir ikki síggja kortini.



*Hendan hondin hevur 14 eygu: 6 í♠, 4 í♥, 4 í♦ og einki í♣.*

## 3. Tel eygu

Virðið á tínum kortum fæst við at telja, hvussu nógv eygu tú hevur. Tað eru bara málabløðini (Ess, Kongur, Frúgv og Drongur) sum telja.
Ess = 4 eygu
Kongur = 3 eygu
Frúgv = 2 eygu
Drongur = 1 eyga
Sostatt eru 10 (4+3+2+1)eygu í hvørjum liti og 40 eygu í hvørjum spæli.

## 4. Sig, hvussu nógv eygu tú hevur

Tann, sum gav kortini, sigur fyrst, hvussu nógv eygu hann hevur. Síðani siga hinir spælararnir, hvussu nógv eygu teir hava – aftur í somu raðfylgju, sum urið gongur. Parið við flestum eygum tilsamans skal spæla og finna eina kontrakt. Hitt parið skal spæla ímóti og royna at gera sítt til, at kontraktin ikki vinnur. Stendur á jøvnum - 20 eygu til hvørt parið - verður givið ummaftur.

## 5. Spælførara síðan

Spælarin við flestum eygum hjá tí parinum, sum hevur flest eygu til samans, verður spælførari og makkarin hjá honum verður “borð”. Um báðir spælararnir í parinum hava eins nógv eygu, so verður tann spælførari, sum segði síni eygu fyrst. Tann, sum skal verða “borð” leggur øll síni kort opin niður á borðið, so tey liggja í røðum og hvør litur fyri seg. Kortini skulu venda móti spælføraranum.

## 6. Melda kontraktina

Spælførarin roknar nú út, hvussu nógv stikk, hann heldur at teirra síðan kann taka til samans. Spælførarin kann velja at spæla uttan trumf ella velja at spæla við einum trumfliti.

## 7. Vel kontrakt

Spælførari kann velja eina “partkontrakt”, sum eru minst sjey stikk, ella spælførarin kann velja “útgang”. Í eini “útgangs”-kontrakt er talið á stikkum, sum skulu meldast og vinnast, knýtt at, hvørjum liti spælt verður í. Verður spælt “uttan trumf” skal spælførarin melda og vinna minst 9 stikk fyri at vinna útgang. Verður spælt við háliti (spaðara ella hjartara) sum trumfi, so skal spælførarin melda og vinna í minsta lagi 10 stikk fyri at vinna útgang. Fyri a vinna útgang í lágliti (rútara ella kleyvara) so skal spælførarin melda og vinna 11 stikk. Um spælførarin





melda og vinnur útgang, so gevur tað fleiri eykastig, enn um man velur eina partkontrakt.
Men – hinvegin – um spælførarin ikki fært tey stikkini, sum hann hevur sagt, so fær mótparturin stig. Tí er valið av kontrakt ein sera týðandi partur av spælinum.
Um spælførarin velur eina trumfkontrakt, so skal “borðið” leggja trumflitin uttast til sína høgru á borðinum.

## 8. Tak stikkini

Hvørt kort verður spælt við myndasíðuni uppeftir, so øll síggja kortið. Spælarin til vinstu fyri spælføraran spælir fyrst út.  Kortið verður ikki tveitt mitt út á borðið, men lagt heilt inni við borðkantin hjá tí sum spælir út. Tá allir fýra spælarar hava spælt sítt kort verða kortini vend við. Fyri lættari at síggja, hvussu nógv stikk hvørt par hevur fingið, venda kortini í vunnum stikkum uppeftir, meðan kortini í taptum stikki verða løgd niður. Tann, sum vinnur stikkið, skal spæla útaftur.

## 9. “Borðið” spælir

Spælførarin avger, hvat fyri kort borðið skal leggja. Borðið má ikki blanda seg uppí, hvat kort skal spælast. Borðið skal eisini leggja síni kort eftir, hvussu nógv stikk bæði pørini hava fingið.

## 10. Spælið endar

Tá øll kortini eru spæld verður talt, hvussu nógv stikk, hvørt parið hevur tikið og úrslitið verður roknað út. Spælararnir skriva úrslitið í ein blokk ella á eitt serligt bridge-pappír. Spælarnir kunnu velja at spæla upp í t.d. 1000 ella at spæla t.d. 8 spøl og telja saman. Brúka stiga-talvuna á næstu síðu at rokna úrslitið út.

## 11. Næsta spæl

Nú verða kortini givin av nýggjum og nú gevur spælarin, sum situr vinstrumegin, tann sum gav seinasta spælið.
Til ber at hava tvey kortspøl, so meðan ein gevur, kann ein annar blanda.



# Stiga-talva

Tað ræður um at fáa flest stikk í hvøjrum spæli og fyri tað fær parið stig.
Fyri at vinna eina partskontrakt verða latin 50 stig eyka, umframt stikk-stigini, sum víst verða í talvu 1 niðanfyri.
Um spælførarin heldur seg kunnu vinna “útgang”, so gevur tað 300 eyka, um útgangurin verður meldaður og vunnin. Meldingarnar í talvu 2 eru útgangs-kontraktir.

Um tú meldar eina partkontrakt, men fær stikk, sum svara til útgang, so gevur tað IKKI eyka fyri útgang. Minnst til, at tey 300 eyka bert verða givin, um kon-traktin áðrenn tit byrja, er ein útgangskontrakt.
Um spælførarin ikki klárar at taka tey stikkini, sum hann hevur sagt, eftir at borðið var lagt niður, so fær mótstøðuparið 50 stig fyri hvørt stikk, sum spælføra-rin fekk ov lítið.

| Hetta eru partkontraktirnar, sum geva 50 eyka. | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7 UT | 7♠ | 7♥ | 7 ♦ | 7 ♣ |
| 8 UT | 8♠ | 8♥ | 8 ♦ | 8 ♣ |
| | 9♠ | 9♥ | 9 ♦ | 9 ♣ |
| | | | 10♦ | 10♣ |

**Stig fyri meldaða og vunna partkontrakt**

| **Talva 1** | **Uttan trumf** | | | **Spaðara/hjartara** | | | **Rútara/kleyvara** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vunnin stikk** | Útrokning | | **Úrslit** | Útrokning | | **Úrslit** | Útrokning | | **Úrslit** |
| | Stikk-stig | Eyka | | Stikk-stig | Eyka | | Stikk-stig | Eyka | |
| **7** | 40 | 50 | **90** | 30 | 50 | **80** | 20 | 50 | **70** |
| **8** | 40 + 30 | 50 | **120** | 2x30 | 50 | **110** | 2x20 | 50 | **90** |
| **9** | 40 + 2x30 | 50 | **150** | 3x30 | 50 | **140** | 3x20 | 50 | **110** |
| **10** | 40 + 3x30 | 50 | **180** | 4x30 | 50 | **170** | 4x20 | 50 | **130** |
| **11** | 40 + 4x30 | 50 | **210** | 5x30 | 50 | **200** | 5x20 | 50 | **150** |
| **12** | 40 + 5x30 | 50 | **240** | 6x30 | 50 | **230** | 6x20 | 50 | **170** |
| **13** | 40 + 6x30 | 50 | **290** | 7x30 | 50 | **260** | 7x20 | 50 | **190** |

**Stig fyri meldaða og vunna útgangskontrakt**

| **Talva 2** | **Uttan trumf** | | | **Spaðara/hjartara** | | | **Rútara/kleyvara** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stikk** | Útrokning | | **Úrslit** | Útrokning | | **Úrslit** | Útrokning | | **Úrslit** |
| | Stikk-stig | Eyka | | Stikk-stig | Eyka | | Stikk-stig | Eyka | |
| **9** | 40 + 2x30 | 300 | **400** | | | | | | |
| **10** | 40 + 3x30 | 300 | **430** | 4x30 | 300 | **420** | | | |
| **11** | 40 + 4x30 | 300 | **460** | 5x30 | 300 | **450** | 5x20 | 300 | **400** |
| **12** | 40 + 5x30 | 300 | **490** | 6x30 | 300 | **480** | 6x20 | 300 | **420** |
| **13** | 40 + 6x30 | 300 | **520** | 7x30 | 300 | **510** | 7x20 | 300 | **440** |

Føroya Bridgesamband
www.bridge.fo
fbs@bridge.fo